# Svar til Óla Jacobsen

ANDRIAS BERGLÍÐ



**Góði Óli, nú hevur tú í skjótt trý ár áhaldandi funnist at nýggja formanninum. Eg trúi, at tú fórt at gevast av tær sjálvum, men tú blívir við at spilla núverandi formann út. Tað hevði verið gott, um tú kundi góðtikið, at fiskimennirnir hava valt ein nýggjan formann**

Tá ið formansvalið var í fiskimannafelagnum fyri skjótt trimum árum síðani, tá bleiv tú ikki nummar eitt, ei heldur nummar tvey, men tú gjørdist nummar trý, og sostatt aftastur av øllum, sum stillaðu upp.

Sjómenn hava valt, og teir vilja hava Jan, tað er veruleikin, sum tú ikki vilt viðurkenna. Men somikið av virðing átti tú at havt fyri sjómanninum, at tú virdi teirra val.

Viðvíkjandi svari tínum til mín í bløðunum, so helt eg ikki, at tú minstist so illa, tí tað eru bara trý ár síðani tú fórt frá.

Tá ið tú vart vrakaður av limum okkara vart tú ikki so frægur, at tú vildi heilsa upp á nýggja formannin, ella seta hann inn í tingini, hóast tað var tín skylda at seta næsta mann í arbeiði. Men Jan fann skjótt útav tí bæði við sjómannasáttmálanum, sáttmálanum við Reiðarafelagið fyri Farmaskip og øllum øðrum viðurskiftum.

Tað sum var uppaftur verri var, at tú vildi heldur ikk i lata lykilin frá tær. Hvat ið hendi skal eg ikki koma nærri inn á, men lásini blivu tíbetur øll skift.

**Oljan**

Tú sigur Óli, at eg eri býttur tað gerst ikki við - men minnist tú tað eina ferðina vit samráddust um sáttmálan á Hotel Hafnia?

Eg var ónøgdur við úrslitið, og vildi ikki skriva undir sáttmálan, tí hann var ov ringur. Tá ið eg síggji sáttmálan á prenti hevur tú kortini prentað mítt navn á sáttmálan. Hetta var ein av mongum skeivleikum tínum.

Tú skrivar í bløðini, at eg havi ikki skil fyri oljuni og oljuprísinum, men tað hevur tú heldur ikki. Undir tí eini samráðingini bjóðaði tú reiðarunum, at fiskimenn skuldu rinda oljuna. Tá bleiv eg illur og spurdi hvat í f**** billar tú tær inn Óli. Eftir hetta fall eg í ónáðir hjá tær.

Hatta er veruleikin, og so kanst tú venda tí sum tú vil, tað var undir hesi samráðing tað tiltikna protokollatið um oljuna kom í sáttmálan, og tað var ímóti mínum vilja.

**Carlton málið**

Hatta sum tú skrivar um mennirnar umborð Carlton, tað er ósatt. Málið um Carlton er fleiri ferðir viðgjørt á nevndarfundum.

Seinast tú gjørdi sáttmála við Næraberg ˆ hetta var ein av mongum sáttmálum, ið tú gjørdi einsamallur - boðaði eg eisini frá, at hann var alt ov ringur.

So kanst tú skriva um hvør er býttur og ikki, men tað søguna kenna vit. Tann sáttmálin var eisini ein av orsøkunum til, at tú ikki varð afturvaldur.

**Jan arbeiðir fyri sjómannin**

Jan er ein maður, ið av øllum alvi arbeiðir fyri fiskimanninum, og ikki ein sum skrivar søgur ella gongur og melur alla aðrastaðni í arbeiðstíðini fyri at savna tilfar saman í eitt blað.

Tú skrivar í greinini um høvdatrog, eg haldi, at títt høvd er í trognum enn.

Hetta eru míni seinastu orð til tín Óla Jacobsen á hesum sinni.

At enda vil eg inniliga heita á teg um at virða, at tað eru sjómenn, sum velja formannin og at sjómennirnir hava valt Jan og ikki teg Óla Jacobsen.

# Samgongan tekur frá teimum, sum eru sjúk

BERGTÓRA HØGNADÓTTIR JOENSEN



Enn fleiri visjónsleysar sparingar á almannaøkinum eru nú ávegis. Ætlanin er at taka rættin hjá teimum, sum eru farin um 66 ár til sjúkradagpening burtur. Sjúkradagpeningur er ein kompensatión sum tímalønt fáa, tá tey gerast sjúk, um tey ikki hava rætt til løn frá arbeiðsgevara undir sjúku. Ætlanin við uppskotinum er, at tey sum nýta rættin til at fáa fólkapensjón, tá tey eru 67 ikki eisini skulu fáa sjúkradagpening. Hugburðurin tykist vera: Hesi fáa ríkiligt sum er!

**Skilabetri broytingar**

Uppskotið vekir fleiri negatívar kenslur eftir mínum tykki. Lógin skarar ikki framúr sum er. Slapp eg at gera bert eina broyting, so var hon, at krav var um uppfylgjandi samrøður á almannastovuni, tá fólk vóru sjúkrameldað. Tað er vegurin fram, um vit ynskja at fyribyrgja uppsagnum og óneyðuga longum sjúkrameldingum.

**Ikki í trá við pensjónsreformin**

Í løtuni arbeiðir ein bólkur við einum nýggjum pensjónsreformi. Eitt tað týdningarmiklasta við hesum reformi er, at fólk verða eggjaði til at vera sum longst á arbeiðsmarknaðinum. Helt, at øll vóru samd um hetta, kortini gongur hetta uppskotið beinleiðis ímóti hesum hugburði. Hvør skal siga: Tá tú arbeiðir vilja vit áhaldandi geva tær posa og sekk, men gerst tú sjúkur, hava vit ikki brúk fyri tær – tí tú ert jú fyltur 67! Hvar er reyði tráurin? Visjónin? Hugburðurin og etikkurin?

Tykist eisini sum ressursuspill – veruliga, at gera slíkt uppskot og senda tað til hoyringar og viðgera tað í tinginum - samstundis, sum ein reformur er í gerð. Nógv fólk hava nú nýtt tíð og orku til hetta uppskotið, heldur enn at brúka til orkuna til veruligar visjónir í mun til eldri á árbeiðsmarknaðinum. Tá landsstýrið nú kemur við hesum uppskotið hugsi eg – hví nú? Trýr samgongan kortini ikki upp á, at reformurin gerst veruleiki? Løtan og endamálið við uppskotinum er margháttlig.

**Enn ein sparing á eldraøkinum**

Skal ikki gera stórvegis burturúr teim sparitiltøkum, sum eru framd seinasta árið á eldraøkinum. Kundi nevnt: Brádliga stuðulinum til dagtilhaldini, sum bleiv tikin burtur í einum høggi, javningina av pensjónum sum bleiv skerd, mongu broytingarnar í samband við stuðul til heilivág, tær 25 milliónirnar í ólavsøkupakkanum og - nú er tað mín sann teimum sum eru fylt 67 ár og kortini geva sítt íkast á arbeiðsmarknaðinum, sum lagt verður eftir.

**Hvør er veruligi hugburðurin?**

Tá eg lesi viðmerkingarnar til uppskotið, tykist hugburðurin at vera: tað er skeivt, at fólk kunnu fáa pensjón og arbeiða. Tí skulu vit spenna bein fyri teimum. Um so er at samgongan heldur tað vera skeivt at fólk fáa pensjón, samstundis sum tey arbeiða, hví sigur samgongan so ikki tað, heldur enn at taka sjúkradagpeningin frá arbeiðandi fólki?

**Rætt at taka frá sjúkum fólkum?**

Skilji ikki etikkin í at geva frískum fólki, men at taka frá teimum, tá tey gerast sjúk – álvaratos hetta skapar ikki álit hjá millum landsins gráa gull – sum eldri fólk á arbeiðsmarknaðinum ofta verða nevnd. Um hugburðurin er, at tey sum eru 67 og arbeiða og fáa pensjón fáa ov nógv, kann tað ongantíð vera rætt at taka frá teimum, tá tey gerast sjúk. Nei! Haldi tað vera rættari at hyggja at, um tað er rímiligt at fáa fulla pensjón, tá ein arbeiðir og er farin um tey 67. Kundi ein onnur kompensatión kanska heldur verið latin teimum sum arbeiða? Størri skattafrádráttur? Árligt bonus, lutvís grundarupphædd ella okkurt annað.

Tað er ógvuliga frástoytandi at taka frá fólki, tá tey eru vorðin sjúk. Tað sama um fólk er 50 ella 67, tá tey gerast sjúk er umsorgan týdningarmikil - umframt kropsligt og likamligt yvirskot til tess at koma fyri seg aftur. Hetta uppskot ger júst tað øvugta. Harumframt er ein sannroynd, at tað er júst, tá fólk gerast sjúk, at tey hava mest brúk fyri peningi – rokningar skulu framvegis rindast, heiligvágur, kostískoyti, kanska reingerð ella okkurt annað er neyðugt at fáa hjálp til. Greitt er, at tað ofta er kostnaðarmikið at vera sjúkur.

# Bústaðamarknaðurin avlagast

**Vandi er fyri, at føroyski bústaðamarknaðurin avlagast, um ávísar broytingar í rentustuðulslóggávuni og uppskotið til fíggjarlóg fyri komandi ár verða samtykt**

*Tíðindaskriv*

- Felagið Peningastovnar leggur upp til ein konstruktivan dialog við Landsstýrið og Fíggjarnevnd Løgtingsins um nøkur av uppskotunum í Ólavsøkupakkanum og uppskotið til fíggjarlóg fyri 2010.

Tað sigur Janus Petersen, formaður í Felagnum Peningastovnar. Ein slíkur dialogur kann røkka tveimum málum: At stilla borgarar líka fyri lógini og at spara tí almenna útreiðslur til rentustuðul.

- Vandi er fyri, at tiltøkini hjá Landsstýrinum avlaga bústaðamarknaðin og stilla borgarar ymiskt, hóast teir sum bústaðareigarar grundleggjandi eru í somu støðu. Prinsipielt er tað óheppið men eisini váði í eini tíð, har bústaðahandilin er uppsteðgaður. Harumframt er møguligt – um rætt verður atborið – at tryggja, at landskassin frameftir sparir útreiðslur til rentustuðul, sigur Janus Petersen.

Hann harmast um, at felagið ikki hevur fingið umrøddu uppskot til hoyringar, áðrenn tey vóru løgd fram men vónar, at Landsstýrið og Fíggjarnevndin eru sinnað at fara í ein skilagóðan dialog við felagið, nú viðgerðin av Ólavsøkupakkanum og fíggjarlógaruppskotinum byrjar.

**Yvirskipað hevur Felagið Peningastovnar hesi sjónarmið:**

Tað er óheppið at Landsstýrið leggur forðingar í vegin fyri upptøku og umlegging av lánum, eitt nú til realkredittfígging, tí hetta fíggingarslag kann vera við til at tryggja, at landskassin frameftir hevur lægri útreiðslur til rentustuðul

Tað er óheppið, at ætlaða hámarkið fyri rentustuðuli er so mikið lágt, at flest øll fara at renna seg í tað, umframt at tað er tengt at rentuni. Skal eitt hámark vera, so eigur tað heldur at verða tengt at lánsupphæddini, so borgarar í somu støðu verða viðgjørdir eins

Tað er púra øvugt, at Landsstýrið fer frá bert at geva sethúsaeigarum fyrimun til frameftir bert at veita lutaíbúðareigarum fyrimun, tí hesir onki hámark fáa fyri rentustuðuli

Orðingin um provisjónir og líknandi gjøld er sera opin og tískil ópræcis og kann geva ivamál um hvat er fevnt av lógini.

*Felagið Peningastovnar*

# ST-dagur hildin í Føroyum

*Tíðindaskriv*

Eisini í Føroyum halda vit ST-dagin, sum eisini verður nevndur føðingardagurin hjá Sameindu Tjóðum. 24. oktober 1945 varð ST formliga sett á stovn, og síðani hevur verið skipað fyri tiltøkum um allan heim fyri at markera hendan dagin.

Demokratia og Javnstøðunevndin ynskja eisini at gera vart við ST-dagin, og hetta verður gjørt við tiltaki í Norðurlandahúsinum. Á skránni eru framløgur um Kvinnurættindasáttmálan hjá ST, eisini nevndur CEDAW.

CEDAW varð samtyktur í ST í desember 1979 og fyllir sostatt 30 ár í ár. Sáttmálin hevur verið í gildi í Føroyum síðani 1983 og varð staðfestur av Føroya løgtingi í 1987. Tiltakið byrjar klokkan 15 og endar klokkan 17.

Lisbeth L. Petersen setir ST-dagin. Síðani eru Elin Mortensen, stjórnmálafrøðingur, og Pól Egholm, málsviðgeri á Sendistovu Føroya á skránni við hvør sínari framløgu. Elin umrøður ST-sáttmálan og tann mun, sum hesir gera. Pól kunnar um sína luttøku til CEDAW próvtøku í ST í New York fyrr í ár. Síðani heldur Herdís Thorgeirsdóttir, professari og dr. Jur., úr Íslandi fyrilestur um CEDAW.

Dorit Hansen er orðstýrari. Høvi verður eisini hjá luttakarunum at seta spurningar.

ST-dagurin verður í Norðurlandahúsinum í Havn leygardagin 24. oktober klokkan 15 til 17.

Tiltakið er alment og ókeypis, og øll eru hjartaliga vælkomin.

**Demokratia og Javnstøðunevndin**